# Fáa fartelefon í Funningsfirði

*Fólk í Funningsfirði hava leingi fýlst á, at tey ikki fáa brúkt fartelefon. Av Føroya Tele verður sagt, at nú verður trupulleikin heilt skjótt loystur*



Edvard Joensen

**Funningsfirði:** Fartelefonnetið riggar ikki í Funningsfirði. Fólk í Funningsfirði siga, at tað er steindeytt. Føroya Tele veit um trupulleikan og arbeiðir við at loysa hann.

Um einki samband er tað sama sum fullveldi, so hava tey fullveldi í Funningsfirði. Í øllum førum tey, sum ætla at nýta fartelefonina. Tí hon virkar ikki.

Fólk í Funningsfirði, sum Sosialurin hevur hitt, siga, at tey hava gjørt var við trupulleikan hjá Føroya Tele og hava fingið lovað, at hann verður loystur. Men tað dregur rættiliga nógv út, siga tey.

Jens Julian Reinert, sum hevur ábyrgdina av basisstøðunum til fartelefonnetið hjá Føroya Tele, váttar, at Føroya Tele veit um trupulleikan. Hann sigur, at júst hatta økið stendur heilt frammalaga á arbeiðsætlanini hjá Føroya Tele.

Arbeiðið við at fáa sambandið til Funningsfjarðar og økið har á leið at virka, er í gongd, sigur hann. Eftir upprunaætlanini skuldi tað verið liðugt longu nú, men ymiskir trupulleikar hava stungið seg upp.

Tað ber ikki til bara at fara í hagan at seta støðir og antennur upp, sum einum lystir. Tað skulu fleiri ymisk loyvi til, og tað kann viðhvørt vera leingi at fáa tey til vega.

Kári Thorsteinsson, sýslumaður í Eysturoy, er formaður í friðingarnevndini fyri Eysturoyar Sýslu. Hann sigur, at hjá friðingarnevndini liggur einki slíkt mál í løtuni. Og hann væntar heldur ikki, at tað fer at verða nakar sum helst trupulleiki at fáa loyvi til at seta eina stong upp, um søkt verður um tað.

Slíkar umsóknir hava verið fyrr, og tær hava altíð verið játtaðar, sigur hann. Nevndin plagar at fara á staðið fyri at tryggja sær, at ikki okkurt heilt óvanligt er, sum ein slík antenna kann skaða. Men tað hevur hann enn ongantíð verið úti fyri, sigur formðaurin í friðingarnevndini.

Ein støð er sett upp Millum Fjarða, sum skuldi virka sum ein roynd at vita, hvussu hon kláraði økið, sigur Jens Julian Reinert á Føroya Tele. Men tað vísti seg tíverri, sigur hann, at hon røkkur bara einum parti av økinum, teir høvdu ætlað og vónað, at hon skuldi klára. Og til Funningsfjarðar røkkur hon als ikki.

Økið er soleiðis háttað, sigur hann, at ógvuliga ringt er at senda í umráðnum. Dalurin er so skeivur og krókutur, og nógv fjøll eru fyri, so tað ber øgiliga nógvastaðni uppfyri. Um ein støð verður sett á eitt fjall onkustaðni, kemur bara eitt annað fyri, áðrenn bylgjan er komin upp á pláss, sigur Jens Julian Reinert.

Og hann sigur, at tað er heldur ikki bara á leiðini kring Funningsfjørð, at hesin trupulleikin er. Tað eru nógvar bygdir, sum einki GSM samband hava. Onkustaðni hevur bara partur av bygdini samband og so framvegis.

Og umstøðurnar í Føroyum eru soleiðis háttaðar, at summar bygdir helst ongantíð fara at fáa GSM fartelefonsamband yvirhøvur, sigur Jens Julian Reinert á Føroya Tele.

# Útlendsk arbeiðsmegi í Oyndarfirði

*Á fiskavirkinum Viking Fisk í Oyndarfirði arbeiða í løtuni eini 10-15 útlendingar. Bara stjórin er føroyingur*



*Á Viking Fisk í Oyndarfirði arbeiða einir 10-15 útlendingar, sum teir flestu eru komnir heilt úr Thailandi*
*Mynd: Edvard Joensen*

Edvard Joensen

**Oyndarfirði:** Viking Fisk í Oyndarfirði hevur eini 10-15 fólk til arbeiðis. Og tey eru útlendingar. Flestu teirra úr Thailandi.

Viking Fisk byrjaði at arbeiða fisk i Oyndarfirði í februar mánað, sigur stjórin, Hendri Tausen. Tá varð avtala gjørd við kryvjivirkið hjá alifelagnum Norex um, at Viking Fisk, sum var granni hjá kryvjivirkinum hjá Norex, skuldi arbeiða sekunda laks frá teimum og selja hann av landinum.

Eisini varð avtalað, sigur Hendrik Tausen, at Viking Fisk ikki skuldi taka arbeiðsfólk frá Norex. Tí varð farið uttanlands eftir arbeiðsfólki. Og flestu teirra komu heilt úr Thailandi.

Stutt eftir, at Viking Fisk var farið í gongd, steðgaði tøkan hjá Norex. Kryvjistøðin varð flutt til Fuglafjarðar, har nógvur laksur varð tikin orsakað av sjúku. Og síðan er tað hent, at norðmenn saman við Vestlax hava keypt Norex, og allur fiskurin haðani verður nú arbeiddur á Vestsalmon í Kollafirði.

Tí fór Viking fisk undir at keypa hvítan fisk á uppboðssøluni hjá Fiskamarknaði Føroya á Toftum, sigur Hendrik Tausen.

Hann sigur, at enn er tað bara smávegis, sum arbeitt verður. Tað er ikki flakavirki sum so, tey hava í Oyndarfirði.

Støðan er, sigur hann, at tey gera royndir fyri eina svenska fyritøku, sum tey samstarva við. Í Oyndarfirði royna tey ymsar framleiðslur, sum so verða avskipaðar til Svøríkis, har hendan svenska heilsølan, tey samstarva við, selur vøruna.

Júst hvat endaliga úrslitið er, vil hann ikki siga, tí hann metir tað sum ein virkisloynidóm, sigur Hendrik Tausen. Men hann væntar, at tað nakað skjótt fer at bera til at fara undir rættiliga framleiðslu, tá tey hava funnið fram til røttu vøruna, sum sviar vilja hava.

Hann sigur, at tey mest hava lagt seg eftir at arbeiða smáfisk á Viking Fisk. Men hesa seinnu tíðina er onkur hendinga sending av laksi eisini komin inn á virkið.

Um útlendingarnar, sum arbeiða á virkinum í Oyndarfirði, sigur Hendrik Tausen, at talan í grundini er um eina familju, sum er komin hendanveg bara til at arbeiða á hesum virkinum. Onkur teirra er giftur her, og tann vegin er sambandið komið í lag.

Hann sigur, at øll hesi fólkini hava fullgott arbeiðs- og uppihaldsloyvi, sum er galdandi eitt ár. Tá tað árið er úti, skulu loyvini endurnýggjast hvønn mánað.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, heldur tað vera løgið, at tað skal vera neyðugt at biða arbeiðsfólk heilt úr Thailandi at abeiða fisk í Føroyum.

Tað hon veit av, sigur hon, manglar arbeiði í fleiri støðum í landinum, har fiskafólk noyðast at fáa ískoyti frá Arbeiðsloysisskipanini.

Og vanliga plaga myndugleikarnir at ráðføra seg við fakfeløgini, tá arbeiðsloyvi verða latin útlendingum, sigur hon, men sigur seg samstundis einki kenna til nakran fyrispurning hesum fólkunum viðvíkjandi.

Fólkini eru limir í Føroya Arbeiðarafelag, sigur Ingeborg Vinther, og leggur aftrat:

»Men tú kanst gott skriva, at tað tók sanniliga tína tíð at fáa tey at gerast limir.«



## Viðmerkingar

# Barnaansingin í Tórshavnar Kommunu



Allir býráðslimir í Havn eru fyri at loysa barnaansingartørvin í kommununi, sum skjótast. Tá Elin Lindenskov í sjálvdrátti ger seg til einaumboð fyri hesum máli og setir tað upp, sum ongin annar er fyri at finnna eina loysn, so er hetta lygn.

Málið hevur verið til viðgerðar í býráðnum, men var ov illa lýst og tí var neyðugt at lata tað fara aftur í nevnd. Neyðugt verður at gera eina kostnaðarætlan og eina útrokning fyri hvussu stórt barnatalið verður.

Býráðið samtykti einmælt (eisini Elin Lindenskov) á fundi tann 5. oktober 2000 at viðgera tilmælið um barnaansinga í sambandi við ársfíggjarætlanina fyri 2001. Samtyktin var soljóðandi: ”Tórshavnar kommuna setir sær sum mál komandi 3 árini at loysa barnaansingartørvin, soleiðis at í seinasta lagi ár 2003 skulu øll børn í kommununi í aldrinum _ ár til 8 ár hava tilboð um mennandi barnagarðs- og frítíðarvirksemi.

Slík mál, sum hesi eru altíð nógv frammi upp undir býráðsval og so dovna tey aftur um áttatíðina valkvøldið. Fyri at hetta ikki skal henda verður neyðugt at málið verður kanna til botns soleiðis at býráðslimir kunnu taka støðu til eitt 100 % seriøst uppskot.

**Schumann Hjaltalin,**
**býráðslimur**

# Dimma á einum skráplani?

*Tað tykist sum at Dimma hevur fingið ómetaliga ilt av, at broyting er komin í, síðani tað vóru ”skrivaðu miðlarnir, sum áttu lýsingamarknaðin”, sum hon sjálv tekur til í oddagrein í Dimmu 12. oktober. Tað er væl skiljandi, at Dimmu ikki dámar meira kapping á hesum økinum. Men lortaspannin yvir Rás 2 tykist mær rættiliga óskiljandi fyri eitt sokallað óheft tíðindablað.*

**Politikkur til sølu?**
Í fyrsta lagi sigur sama oddagrein, at ”Rás 2 er farin at selja politikk í tíðindahøpi!” Í øðrum lagi verður sagt, at Loftmiðlanevndin ”tók eina prinsipiella avgerð herfyri, sum ikki gav Rás 2 loyvi at selja politikk í tíðindahøpi...hetta fyri at halda veruliga upplýsing frá bíløgdum tíðindaflutningi!” Í triðja lagi sigur sama oddagrein, at mentamálaráðharrin, ”sum einki skil hevur á fjølmiðlum, gjørdi avgerðina til einkis”, og so verður illgitt um, at hann gjørdi hetta eftir innanhýsis politiskum trýsti, og at hann ”hevur lagt lunnar undir bíløgdum tíðindaflutningi!” Fyrsti pástandurin er blóðskeivur. Rás 2 er í tíðindahøpi als ikki til sølu og er fullkomiliga óheft politiskt. (Kunnu vit siga tað um Dimmu?)

Annar pástandurin er beinleiðis ósannur — Loftmiðlanevndin tók onga prinsipiella avgerð, men vísti harafturímóti á, at soleiðis, sum kringvarpslógin er orðað, so varð ”óhefta redaktionella ábyrgdin hjá stovninum sett til viks”, og at ætlaðu valsendingarnar ikki vóru sambærligar við lógarinnar tekst.

**Redaktionell ábyrgd**
Eingin tíðindaberi — heldur ikki Dimma — hevði funnið seg í, at ein lóg setti óheftu redaktionellu ábyrgdina til viks. Tí kærdi Rás 2 eisini til Mentamálastýrið beinanvegin.

Brævið frá Mentamálastýrinum er undirskrivað av Kára D. Petersen, advokati, og ikki av Tórbirni Jacobsen, og er ein juridisk niðurstøða og avgerð. Stýrið vísir á, at Rás 2 hevur loyvi at taka ímóti ískoytisveitingum, og eisini at gera politiskar sendingar, ”har tann eina politiska áskoðanin



ikki fær størri ávirkan enn ein onnur”.

Í niðurstøðuni verður beinleiðis sagt, at ”soleiðis, sum ætlanin er hjá Rás 2, koma sendingarnar ikki í stríð við ætlanirnar í lóg og kunngerð, og flokkarnir hava ikki størri ávirkan á innihaldið, enn teir vildu havt ella fáa við sendingum í almennu loftmiðlunum uttan at gjalda!”

So einfalt.

Allir flokkarnir luttaka á jøvnum føti, fáa somu tíð tillutaða, og eingin teirra fær størri ávirkan enn ein annar. Tað vil eisini siga, at journalistiski integriteturin hjá stovninum verður virdur. Og tað merkir eisini, at politisku flokkarnir, sum fáa almennan pening til politiska upplýsing, á jøvnum føti hava loyvi at vera ískoytisveitarar hjá Rás 2. Og óneyðugt skuldi verið at sagt, at hetta hevur einki við tíðindasendingar at gera — sendingarnar verða skrálagdar sum aktuelt upplýsandi tilfar á sama hátt sum vanligt er í ÚF.

**Troling á landleiðini!**
At sama oddagrein leggur m.o. okkum undir, at tíðindaflutningurin verður stýrdur av, hvør vil gjalda mest, kunnu vit so bara taka sum eitt fornermilsi. Men tá samstundis verður sagt, at fjølmiðlar við ongum tíðindaflutningi eru óálítandi og lítið áhugaverdir at lýsa í, tí eingin tekur teir fyri fult, so man leiðslan á Dimmu valla nakrantíð tendrað parabolina, tí flestu lýsararnir finnast har, tíðindaflutningurin er minst. Og so mátti fornermilsið hjá Dimmu móti Rás 2 eisini verið óneyðugt.

Tá so sama oddagrein samanber okkara lýsingamarknaða við at trola á landleiðini — har nøkur skip trola við almennum stuðuli — so haltar logikkurin heilt álvarsliga. Fyri tað fyrsta spyr fiskurin ikki trolið eftir, hvør eigur tað. Eisini veldst um skiparan, manningina, íløguna og umsitingina. Og høvuðsmunurin millum fiskin og føroysku lýsararnar er, at lýsararnir **sjálvir** avgera, hvar teir lýsa. Og man tað ikki vera har, trupulleikin hjá Dimmu liggur — at ein lýsari í ein mánaða kann senda 85 ljóðlýsingar á Rás 2 fyri tað, sum **ein** heilsíða í litum kostar í Dimmalætting!!??

Tá so Dimma harafturat tosar um at ”virka undir somu treytum”, so skal eg líka heilsa og siga, at vit heldur ikki kunnu krevja lurtaragjald — samanber við haldaragjaldið hjá Dimmu — vit kunnu ikki sløkkja hjá einum lurtara, sum ikki vil gjalda. Vit fáa ongan almennan ella kommunalan stuðul. Vit hava bert inntøkur frá beinleiðis lýsingum og ískoytisveitingum.

Tað kostar pengar at keypa eitt eintak av Dimmu — sum forrestin er floytifull av politikki hvønn dag — men tann dag, Beate sendir Dimmu ókeypis út í hvørt hús, tá kunnu vit tosa um at ”virka undir somu treytum!”

Og legg merki til: Eingin lóg forðar politisku flokkunum í at vera ískoytisveitarar hjá skrivaðu fjølmiðlunum!

-

Størsti vinningurin fyri Rás 2 í hesum sambandi er, at staðfest er, at redaktionella ábyrgdin ikki kann setast til viks, og at tað verður viðurkent, at vit á Rás 2 hava somu redaktionellu ábyrgd sum hinir loftmiðlarnir, og at vit megna einsvæl at umsita eina slíka.

**Ó.J.Rólantsson**
**Programmleiðari,**
**Rás 2**

# Ungdómsnevnd at ráðgeva politikarunum



Øll vita, at tað oft er ringt at fáa samljóð og kanska enntá bert dialog ella samrøðu ímillum politikarar og ungdómin. Hetta er eitt vanligt fyribrygdi, ikki bert í Klaksvík. Tey ungu eru alt ov sjálvdan alment frammi við sínum hugsanin og vera tey tí ofta nevnd tað tigandi ættarliðið.

Fyri at bøta um hetta, at politikarnir snøgt sagt ikki vita hvat ið tey ungu vilja, er okkara uppskot at seta eina ungdómsnevnd, ið til dømis kundi haft tvey umboð úr 10 flokki og 2 umboð úr miðnámsskúlunum, at samskifta við politikarnir.

Fyri at hetta skal bera til mugu vit eisini hava eina umsiting í býráðnum, ið kann hjálpa og leggja lag á, eins og hon má ráðgeva politikarnum. Vit hava onga mentunnarella trivnaðarumsiting á býráðnum í dag, og hetta meta vit er skeivt.

Vit hava júst fingið sosialu deild upp at standa, so nú má túrurin verða komin til mentanina. Ein framkomin býur við so livandi mentunnarlívið sum Klaksvíkin kann ikki ongan góðan eiga, tá ið tað kemur til mentan og trivnað.

Eg havi skriva tað fyrr og endurtakið fegin, at tað serliga er tey ungu ið ikki hava ítrott ella bara ítrott sum áhugamál, tann bólkurin er serliga við sviðusoð og hetta má bøtast um.

**Eydgunn Samuelsen,**
**býráðslimur fyri**
**Javnaðarflokkin.**

**www.get.to/eydgunn**

